## Rógvi skoraði aftur

KR spældi um vikuskiftið venjingardyst ímóti Drátti, og KR vann dystin 3-1. Føroyski landsliðsspælarin Rógvi Jacobsen spældi við allan dystin, og hann skoraði seinasta málið í dystinum. Álopsfelagin hjá Rógva, Grétar Ólafur Hjartarson, skoraði hini bæði málini hjá KR. Felagið hjá Rógva hevur nú spælt tveir venjingardystir, teir hava vunnið báðar, og Rógvi hevur gjørt trý mál í hesum báðum dystum. Málið hjá Rógva um vikuskiftið er tað tíggjunda, sum hann hevur gjørt fyri KR.

**ek**

## Símun upp á spæl

Føroyski landsliðsspælarin Símun Samuelsen lá fram við, tá ið Keflavík leygardagin spældi venjingardyst ímóti ÍBV. Keflavík vann dystin 2-0, og tað halda teir verða eitt óføra gott úrslit. Annað av málunum skoraði Símun Samuelsen. Í seinna hálvleiki legði ÍBV trýst á Keflavík, men Símun og liðfelagarnir hildu málið reint og vunnu dystin.

**ek**

## Malan venur AB

Argja Bóltfelag hevur longt sáttmálan við Maluna Mohr sum kvinnuvenjari hjá felagnum. Tað skrivar heimasíðan hjá AB. Malan var eisini í fjør venjari hjá kvinnunum hjá AB, og tá endaði liðið sum nummar 4 av 6 liðum. Venjingin hjá AB-kvinnunum byrjar fyrst í februar.

**ek**

## Suni er á veg

Superligafelagið AaB er farið á venjingarlegu í Turkalandi. Sunnudagin vandi spælararnir fyri fyrstu ferð á hesari venjingarlegu, og týsdagin spæla teir dyst ímóti ukrainska liðnum FC Illichivets Mariuspil. Bæði Jón Rói Jacobsen og Suni Olsen eru við á venjingarleguni. Jón Rói venur sum vanligt, meðan Suni Olsen, ið hevur havt ein skaða í fótinum, er farin at venja aftur, og sunnudagin var hann við í tí mesta undir venjingini. AaB-heimasíðan skrivar, at Suni nú skal fáa formin upp á pláss aftur, eftir ein steðg í tveir mánaðir.

**ek**

# Ble settur uttanfyri í Vági

**Ein tilburður undir venjing í Vági sunnudagin hevur skapt iva um framtíðina hjá miðvallarspælaranum Evrard Ble í VB. Venjarin Ole Andersen sigur, at Ble venur fyri seg sjálvan hesa vikuna, meðan málið verður viðgjørt**

Fótbóltur
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Tað, sum hendi, kann als ikki góðtakast, og tí venur Ble fyri seg sjálvan hesa vikuna, meðan hendingin verður viðgjørd í felagnum, sigur venjarin Ole Andersen um tilburðin undir venjingini sunundagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Evrard Ble taldist millum profilarnar í føroysku fótbóltskappingini í fjør. Arbeiðssami og ídni miðvallarspælarin var ein eyðsýndur partur av VB-liðnum, sum stríddist fyri at sleppa undan niðurflyting.

Nú er framtíðin hjá Ble í VB ivasom. Orsøkin er ein tilburður undir venjing sunnudagin, har Ble brast saman við ein annan spælara. Venjarin hjá VB, danin Ole Andersen, váttar, at ein tilburður var, men hann vil ikki siga nakað ítøkiligt um hendingina.

– Tað, sum hendi, kann als ikki góðtakast, og tí venur Ble fyri seg sjálvan hesa vikuna, meðan hendingin verður viðgjørd í felagnum. Hvørjar avleiðingarnar verða fyri Ble er ikki gjørt av enn, men skal hann halda fram í felagnum, so skal nógv mýkjast og tosast áðrenn, sigur Ole Andersen.

Sosialurin skilir, at Ble leyp fram av mótvegis einum øðrum spælara, og spælarin, sum tað gekk út yvir, fekk ein løst í andlitið og hevur ikki kunnað vant síðani.

### Letur væl at innsatsi

Ole Andersen er nýggjur venjari í VB, og hóast hann er greiðir yvir, at liðið hevur mist týðandi spælarar við eitt nú Mortan í Hørg og Milan Kulic, sum báðir eru farnir til HB at spæla, hevur hann góðar vónir til kappingina.

– Venjingin gongur sera væl, og spælararnir fara at koma í sera góðan form. Nú vita vit ikki endaliga, hvussu liðið hjá okkum verður mannað, men eg vænti, at VB fer at spæla ein positivan leiklut í kappingini í ár, sigur Ole Andersen.

Ætlanin er, at litavski verjuspælarin Dalius Staliliunas, ið spældi við VB fyri tveimum árum síðani, skal koma aftur til VB í ár, og onkur annar útlendskur spælari er eisini upp á tal.

# Tromsø vann og tapti

**Um vikuskiftið spældi BK Tromsø teir báðar útsettu dystirnar frá farna vikuskiftið. Fyrra dystin vann felagið uttan annan av føroysku spælarunum, men toppdysturin endaði við tapi**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

BK Tromsø hevði eitt misjavnt vikuskiftið í norsku flogbóltskappingini. Tveir dystir vóru á skránni, og leygardagin var liðið hjá Rúna Weihe og Bárður B. Mikkelsen í Tróndheim og spældi ímóti Dragvoll.

Hendan dystin manglaði BK Tromsø Rúna Weihe og tveir aðrar lyklaspælarar, men teir megnaðu tó at hála ein tepran 3-2 sigur í land.

Settúrslitini vóru: 18-25, 25-23, 25-22, 21-25 og 7-15.

### Taptu toppdyst

Sunnudagin var toppdystur ímóti Kristianssund á skránni. Hesaferð var Rúni viðaftur, men tað eydnaðist ikki Tromsø at gera nakað við sterka oddaliðið, sum vann dystin 3-0. Settúrslitini vóru: 25-20, 25-18 og 25-19.

Heimasíðan hjá BK Tromsø skrivar, at liðið hevði ikki ein av sínum bestu døgum hendan. Spælararnir gjørdu nógvar servufeilir og kláraðu ikki at leggja trýst á liðið úr Kristianssund.

Næsti dystur hjá BK Tromsø verður um vikuskiftið ímóti Oslo Volley.



*Rúni Weihe og liðfelagarnir í BK Tromsø taptu sunnudagin toppdyst í Kristianssund*